# Fólkatingval verður útskrivað týsdagin

**– Tað eru ikki bara vit tíðindafólk sum vænta fólkatingsval tann 8. februar. Eg havi tosað við eina rúgvu embætismonnum, framsøgumonnum, vanligu fólkatingslimum og ráðharrum, sum sita forsætisráðharranum nær, og tey vænta eisini, at forsætisráðharrin skrivar út nýval týsdagin, fortelur Henning Olsson, sum er royndur tíðindamaður hjá DR á Christiansborg**

FÓLKATINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*–Vit tíðindafólk á Christiansborg eru á einum máli um, at Fogh skrivar út nýval komandi týsdag. Útsagnirnar hjá forsætisráðharranum seinastu dagarnar hava verið eitt greitt tekin um, at valdysturin er farin í gongd. Vit vænta øll eitt Fólkatingsval týsdagin tann 8. februar, sigur Henning Olsson, sum er tíðindamaður hjá Danmark Radio á Christiansborg.*

– Vit tíðindafólk á Christiansborg eru á einum máli um, at Fogh skrivar út nýval komandi týsdag. Útsagnirnar hjá forsætisráðharranum seinastu dagarnar hava verið eitt greitt tekin um, at valdysturin er farin í gongd. Vit vænta øll eitt Fólkatingsval týsdagin tann 8. februar, sigur Henning Olsson, sum er tíðindamaður hjá Danmark Radio á Christiansborg.

Í alt heyst hevur dúgliga verið gitt, nær danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, fer at skriva út nýval til Fólkatingið. Flest øll væntaðu, at danski forsætisráðharrin fór at boða frá nývali fyrst í januar mánaði, men síðan herjaði herviliga flóðaldan í Suðureystasia, og tað varð av fleiri mett at vera høvuðsorsøkin til, at Anders Fogh Rasmussen útsetti fráboðanina.

Nú er kortini aftur komið ferð á leysatíðindini í donsku fjølmiðlunum um nýval.

– Tað eru ikki bara vit tíðindafólk, sum vænta fólkatingsval tann 8. februar. Eg havi tosað við eina rúgvu av embætismonnum, framsøgumonnum, vanligu fólkatingslimum og ráðharrum, sum sita forsætisráðharranum nær, og tey vænta eisini, at forsætisráðharrin skrivar út nýval týsdagin, fortelur Henning Olsson.

### Opið valsstríð

Tað er serliga eftir landsfundin hjá teimum Radikalu um vikuskiftið, har Anders Fogh Rasmussen var gestarøðari, ið aftur hevur sett ferð á leysasøgurnar um Fólkatingsval Á landsfundinum gav forsætisráðharrin til kennar, at stjórnarflokkarnir ynsktu at fáa danska Javnaðarflokkin við í endurskipanini av danska vælferðarstatinum.

– Handa útsøgnin var heilt greitt eitt taktiskt spæl frá Anders Fogh Rasmussen til valstríðið. Handan útsøgnin ger, at tað verður torført hjá Javnaðarflokkinum at leypa á stjórnarflokkarnar fyri ikki at gera nakað við vælferðarstatin, tí nú kann forsætisráðharrin vísa svart upp á hvít, at stjórnarflokkarnir sanniliga ynskja at fremja broytingar, og helst saman við Javnaðarflokkinum. Útsøgnin kann avgjørt skaða møguleikarnar hjá Javnaðarflokkinum í valstríðnum, tí sum flestum kunnugt er vælferðarstaturin eitt hjartamál hjá Javnaðarflokkinum, greiðir Henning Olsson frá.

Hann leggur afturat, at tíðindafundirnir hjá forsætisráðharranum á Christiansborg bæði týsdagin og mikudagin ber týðuliga boð um, at eitt Fólkatingsval stendur fyri durum.

– Mikudagin var tíðindafundur um innsavningina í samband við vanlukkuna í Suðureystasia. Hóast flest øll væntaðu, at forsætisráðharrin fór at halda seg til at tosa um vanlukkuna, fýrdi Fogh ikki fyri at tosa um fleiri evnir, sum verða høvuðsevni í valdystinum, og hetta gjørdi hann uttan, at vit spurdu um nakað. Eisini á tíðindafundinum týsdagin hevði Fogh eisini eina rúgvu av útsagnum, sum greitt boða frá, at valdysturin er byrjaður og fólkatingsval er í nánd. Alt hetta ger, at vit eru sannførd um, at val verður útskrivað týsdagin, fortelur Henning Olsson.

### Kommunurnar í buktini

Seinastu mánaðirnar hava fleiri veljarakanningar víst, at stórur partur dønum halda, at stjórnin við Vinstra og teimum Konservativu og Dansk Folkeparti sum stuðulsflokki stendur seg væl, meðan undirtøkan fyri Javnaðarflokkinum og teimum Radikalu minkar.

Góðu úrslitini í veljarakanningunum hava eisini skumpa undir leysasøgurnar um nývalið, tí Anders Fogh Rasmussen og stjórnarflokkarnir standa, í løtuni til at vinna ein greiðan sigur á andstøðuflokkunum.

Forsætisráðharrin hevur kortini leingi ynskt, at stjórnin klára at samtykkja umfatandi kommunureformin í Fólkatinginum, áðrenn hann skrivar útskrivar val. Tað er kortini nógv, sum bendir á, at stjórnarflokkarnir ikki fara at megna at samtykkja kommunureformin, áðrenn summarfrítíðina, og tí velur forsætisráðharrin at skriva út nýval longu nú.

– Fyri at kommunalreformurin skal gjøgnumførast er neyðugt, at ein hópur av lógarbroytingum skulu ígjøgnum í Fólkatinginum, og tað virkar rættiliga ósannlíkt, at stjórnarflokkarnir megna at gjøgnumføra kommununalreformin, áðrenn summarfrítíðina, tí lógararbeiðið er so umfatandi. Tískil skrivar hann helst út nývál, áðrenn kommunalreformurin fer í gjøgnum Fólkatingið, og okkara boð er so komandi týsdag sigur Henning Olsson skemtandi.

## Edmund fer eftir fólkatingssessinum

Við seinasta fólkatingsval fekk sambandsmaðurin og løgtingsformaðurin Edmund Joensen heili 1000 atkvøður, men var tað ikki nóg mikið at koppa Lisbeth L. Petersen. Men nú fer royndi politikarin aftur at royna.

– Heitt hevur verið á meg av Eysturoyar Sambandsfelag at stilla upp til komandi fólkatingsval, og hesum havi eg játtað. Eg fari at royna mítt besta, og so mugu vit síggja, hvussu langt tað ber, sigur ein stuttorðaður Edmund Joensen við Sosialin.

**HíS**

## Kaj Leo sigur einki um valevnini

Aðrastaðni í blaðnum siga serfrøðingar á Christiansborg, at nýval eftir øllum at døma verður útskrivað týsdagin í komandi viku. Formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, sigur seg vera væl fyrireikaðan og til reiðar til valdystin, sum teir hava fyrireikað seinastu mánaðirnar.

### Eingi nøvn

Men sambandsformaðurin vil ikki siga tað stóra um valevni Sambandsfloksins til harða dystin.

– Listin verður almannakunngjørdur á tíðindafundi eftir at nýval er útskrivað, men eg kann siga so mikið sum, at listin er justeraður uttan tær heilt kollveltandi broytingarnar, sigur Kaj Leo Johannesen.

Fyri føroysku flokkarnar er talan um triðja valið innanfyri eitt ár, og spurdur, um fíggjarliga orkan til kostnaðarmikla valdystirnar ikki fer at ganga undan, er Kaj Leo greiður.

– Fíggjarliga eru vit væl fyri at fara í gongd við valdystin. Vit spardu nakað undir valdystinum til bý- og bygdaráðsvalið, kanska spardu vit ov nógv, men Sambandsflokkurin er á allan hátt til reiðar, sigur formaðurin at enda.

**HíS**

## Kallsberg tekur tað róligt

Formaður Fólkafloksins heldur láan profil, hóast søgurnar vilja vera við, at danski forsætismálaráðharrin útskrivar nývál týsdagin.

– So leingi einki nýval er útskrivað, taka vit tað heilt róligt. Eingin endaliga støða er tikin um listar og valevni, sigur Anfinn Kallsberg

Spurdur, hvussu fíggjarliga støðan er til ein triðja valdyst innanfyri eitt ár, sigur Anfinn, at valdystir nú á døgum gerast alsamt dýrari, men flokkur hansara er til reiðar.

– Í valdysti til fólkatingsval eru vanliga færri frontkandidatar, samstundis sum tíðarskeiðið frá útskrivan til valdag eisini er styttri, so hesin valdysturin er ikki eins kostnaðarmikil, sigur Anfinn, sum leggur afturat, at fíggjarligi parturin ikki er nakar trupulleiki.

**HíS**

## Helena og Heðin umhugsa støðuna

Javnaðarlimirnir Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen siga seg einki hava hhoyrt um uppstillingarfundir, valevni og listar hjá Javnaðarflokkinum í samband við fólkatingsvalið. "Nýggju" limirnir í flokkinum eru í bíðistøðu, men bæði siga seg vilja umhugsa støðuna, um heitt verður á tey at stilla upp.

– Eg havi einki hoyrt, og eg velji ikki sjálv, um eg stilli upp, men um heitt verður á meg, umhugsi eg avgjørt møguleikan, sigur Helena Dam á Neystabø.

Borgarstjórin Heðin Mortensen kann ikki gerast fólkatingslimur, uttan at hann sigur frá sær núverandi sess, so um hann stillar upp, verður tað fyrst og fremst fyri at stuðla listanum.

– Eg havi nóg mikið um at vera, men um boð vera eftir mær, skal eg umhugsa møguleikan, sigur Heðin Mortensen.

**HíS**